## Stomifeløg á vitjan

Komandi dagarnir hittast umboð fyri stomifeløg úr øllum Norðanlondum í Føroyum. Tað er Stomibólkurin undir Føroya Felag Móti Krabbameini og Stomiambulatorii á Landssjúkrahúsinum, sum eru vertir. Stomi er ikki ein sjúka, men ein fylgja av eina skurðviðgerð. Fólk við stomi hava fingið gjørt op á búkinum til land ella skarn – fyribils ella restina av lívinum. Umleið 70 fólk í Føroyum hava stomi. Orsøkirnar, til at stomi skurðviðgerðir verða gjørdar, eru m.a. krabbamein, kroniskur bruni í tarmunum ella viðfødd brek. Ráðstevnan er á hvørjum ári skiftandi í norðurlendsku londunum, og er hon fyri áhugafeløg við sjálvbodnum fólki.




## Alarmur í gongd

Um nátturðatíð mánakvøldið fór ein alarmur í gongd á Sjúklingahotellinum Tórshavn í Keypmannahavn. Sløkkiliðið kom á staðið og fólk vórðu flutt út úr bygninginum. Í gjár høvdu vit samband við hotellið og haðani verður sagt, at ein tekniskur feilur var orsøkin til, at tað mánadagin um nátturðatíð brádliga fór at ýla á Sjúklingahotellinum í danska høvuðsstaðnum. Tey siga somuleiðis, at einki hendi við nøkrum á hotellinum.

# Átta ár fari

**Hon hevur í átta ár roynt alt fyri at gerast føroyingur. Men hevur fingið nógvar lúsingar á vegnum. Viðhvørt ivast hon í, um føroyska samfelagið yvirhøvur skoytir um hana og dóttrina**

ÚTLENDINGAMÁL
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Eg havi verið vónbrotin so ofta, at eg tori ikki at vóna nakað sum helst.

Í meiri enn átta ár hevur Natasha Vukotic í Hvalba hingið í leysari luft.

Øll hesi árini hevur hon gjørt alt, sum hon kann, fyri at gerast føroyingur. Men hóast nógv ár eru gingin, følir hon framvegis, at hon stendur í akkurát sama stað, sum hon gjørdi, tá ið hon skrivaði til føroyskar myndugleikar fyrstu ferð, heilt afturi í 1999.

Tað einasta, hon higartil hevur fingið burturúr er vónbrot oman á vónbrot.

Søgan um Natashu er ein søga um, hvussu føroyingar fara við við øðrum fólkasløgum, sum halda, at Føroyar eru eitt deiligt land at búgva í. Tað er ein søga um, hvussu hugburðurin hjá summum almennum starvsfólkum í Føroyum er til útlendingar. Men tað er eisini søgan um almenn starvsfólk, sum ikki vita, hvat tey hava við at gera og sum av tí sama í heilum varta upp við skeivum upplýsingum, eisini í heilt avgerandi viðurskiftum.

– Tað, eg ferð eftir ferð upplivi hjá myndugleikunum er líkasæla og niðurgerðing og eg siti mangan eftir við eini kenslu av, at eg eri bara til fortreð, tá ið eg spyrji um nakað.

Hon veit ikki um tað er tí at hon er útlendingur, ella um tað er tí, at hon er konufólk.

Men hon er í øllum førum púra vís í, at ein miðaldrandi, slipsaklæddur føroyingur, hevði ikki fingið somu viðferð, hon hevur fingið frá myndugleikunum.

Hon heldur, at uttan mun til, hvat hon er, ella hvør hon er, átti tað at verið ein minstakrav, at hon ikki varð niðurgjørd og hálvgum hildin fyri gjøldur av almennum starvsfólki.

### Óynskt í Føroyum

Sjálv heldur Natasha, at hon hevur gjørt, alt, sum hon kann fyri at gerast føroyingur.

– Men viðhvørt ivist eg í um føroyska samfelagið yvirhøvur skoytir um okkum, sigur hon.

Men tað, sum ørkymlar hana mest av øllum, er, at hon fær oftani mótstríðandi upplýsingar, alt eftir, hvørjar myndugleikar, hon tosar við.

– Ein myndugleiki tosar í eyst og ein annar tosar í vest, so eg veit ongantíð, hvat eg kann gera fyri at koma víðari, sigur hon.

Men tað finnast eisini undantøk, tí Natasha skundar sær at leggja afturat, at fyri nøkrum døgum síðani kom hon fyrstu ferð í sambandi við eina konu í innlendismálaráðnum.

– Hon var heilt ótrúliga fitt og hjálpsom og læt meg sita eftir við eini týðiligari kenslu av at hava fingið eina virðilia viðferð.

So hóast lúsingarnir hava verið nógvir á vegnum, hevur hon nú kortini eina vón um, at tað fer at ganga og at hendan maraton renningin frá Heródisi til Pilatus øll hesi árini, skjótt fær ein góðan enda, so at hon loksins kann sleppa at kalla seg føroying.

– Eg havi altíð gjørt akkurát, soleiðis sum myndugleikarnir hava biðið meg um, men tað hjálpir onki.

Men eg føli tað sum um, at eg fái bara háð og spott afturfyri.

– Øll skríggja eftir at fáa meiri útlendska arbeiðsmegi til Føroyar. Men eg haldi, at myndugleikarnir skuldu roynt at fingið viðurskiftini hjá okkum, sum longu eru her, í rættlag, áðrenn roynt verður at slúsa fleiri útlendingar higar.



*- Eg havi somu dreymar um útbúgving og arbeiði sum mínar vinkonur. Eg droymi eisini um kunna mála húsini og at fáa bil. Men eg kann ikki annað enn droyma, tí í samfull átta ár havi eg ikki kunnað gjørt nakað, sigur Natasha Vukotic*

Sum tað sæst í hinari greinini, varð ein umsókn frá henni broytt, uttan at hon varð kunnað um tað.

– Og á einum almennum stovni, gjørdi eitt starvsfólk mær púra greitt, at í veruleikanum hevði eg ongi rættindi. Bað arbeiðsgevarin meg hoppa, skuldi eg hoppa. Men soleiðis fer man ikki við fólki, tí ein slíkur hugburður minnir um trælahald og hugburðin hjá harrafólki til tey undirgivnu.

– Tað er eisini týðiligt at merkja, at tað irriterar starvsfólkið, tá ið eg spyrji. Onkur hevur enntá spurt, hví eg altíð skal spyrja so nógv og hvat eg skal hava alt hetta at vita til.

– Men tað er mítt lív, tað snýr seg um, so tað er ein løgin og niðurgerðandi hugburður, at eg ikki skal kunna spyrja fyri at vita, hvar eg flóti.

Tá ið Natasha hevur havt arbeiðsloyvi, hevur hon arbeitt á flakavirki.

Natasha sigur, at hon veit væl, at tað er kanska ikki so høgt í metum at standa á einum virki og skera flak.

– Men fyri tað hava flakafólk virðing uppibornað, leggur hon afturat.

Hon leggur afturat, at hóast hon er útlendingur, kann hon brúkast til annað enn at skeera flak og hon skilir ikki, hví tað skal verða so tvørligt at sleppa til arbeiðis.

Hon søkti eisini í 2003 um varandi uppihaldsloyvi í Føroyum. Men tað kundi hon ikki fáa, tí fyri at fáa tað, skal eg hava búð í Føroyum í sjey ár, uttan íhald og tær treytirnar uppfylti hon ikki.

Hon hevur eisini fingið at vita, at hon kann ikki søkja um varandi uppihaldsloyvi fyrrenn í desember í ár, tí fyrst tá lýkur hon allar tær tær fløktu, løgfrøðiligu fortreytirnar.

Men so kom hon fyri stuttari tíð síðani á tal við áðurnevndu hjálpsama konuna í innlendismálaráðnum.

– Hon kannaði málið og staðfesti, at eg í veruleikanum kundi havt søkt um varandi uppihaldsloyvi í fjør – altso fyri einum heilum ári síðani.

Sostatt er aftur her eitt heilt ár farið fyri skeyti og tað er so bara eitt dømi um, hvussu mótstríðandi upplýsingar hon hevur fingið, alt eftir hvønn myndugleika, hon tosar við.

Í farnu viku søkti hon sostatt um varandi uppihaldsloyvi.

Hon hevur fingið at vita, at vanliga tekur tað fýra